Ímillum

**Føroya Reiðarafelag** øðrumegin
og
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** hinumegin,

verður gjørd henda semja:

Í felagsreglunum í sáttmálanum, sum fór úr gildi 01.01.2015 verða gjørdar hesar broytingar:

***1. Partur. Felagsreglur.***

**Almenn viðurskifti**

**Bólk at endurskoða sáttmálabygnaðin, dagføra felagsreglurnar o.a.**

Veturin 2013/2014 hava formenninir í manningarfeløgunum saman við stjórunum í Føroya Reiðarafelag og Felagnum Nótaskip gingið ígjøgnum felagsreglurnar. Endamálið var í stuttum at eyðmerkja tørvin á dagføringum, t.d. tí viðurskiftini í vinnuni eru broytt ella tí sáttmála-ásetingar eru óneyðugar og/ella broyttar av lóggávu.

**Skotið verður upp, at umboð fyri manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag beinanvegin, tá ið hesar sáttmálasamráðingarnar eru av, fara undir at dagføra og endurskipa sáttmála-bygnaðin, felags- og serreglur umframt semjur, ískoyti v.m., sum eru gjørd gjøgnum árini.**

Umframt dagføringar verður eisini hugt eftir bygnaðinum í sáttmálanum, m.a. við tí enda-málið at reiðarí og manningar í felag kunnu velja at skipa seg soleiðis sum tey koma ásamt um og sum hóvar virkseminum hjá avvarðandi fyritøku.

**Skotið verður upp, at bólkurin verður mannaður við 2 umboði fyri hvørt av manningar-feløgunum og 2 umboðum fyri Føroya Reiðarafelag.**

Bólkurin skipar seg við óheftum skrivara og kann av og á skipa fyri tiltøkum, har hvør partur er breitt umboðaður. Miðast skal ímóti, at bólkurin skal vera liðugur við sítt arbeiði í seinasta lagi á heysti 2016.

**§ 22, stk. 10: inntøkutapstrygging**

Sett verður inn nýtt 2. og 3. punktum, ið er soljóðandi: "Í sambandi við útgjald av inntøku-tapstrygging gera reiðarí og skipari uppskot um fordeiling millum teir, ið veruliga hava mist inntøku vegna skaðan. Uppskotið verður sent manningarfeløgunum til kunningar og hava manningarfeløgini ikki meldað aftur innan 14 dagar, verður fordeilingin at rokna sum góðtikin.

**§ 2. Mynstring**

Sum nýtt stk. 2 a verður ásett:

"Stk. 2.a. Eingin útmynstring verður úr føroyskari havn jólaaftan, jóladag og 2. Jóladag."

**§ 5. Heimferð**

Stk. 2 verður broytt soleiðis:

"stk. 2. Skipari og stýrimenn skulu tó halda fram í starvinum í upp til tvær vikur, um tað verður mett at skipið í hesum tíðarskeiði kemur í havn, haðani heimferðin fer at kosta munandi minni, ella er munandi lagaligari.

**§ 10. Skipsarbeiði**

Stk. 6 verður broytt soleiðis:

"Stk. 6. Skipari og stýrimenn, sum arbeiða umborð á fiskifari millum túrar, verða løntir samsvarandi sáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Arbeiðsgevara-felag/Føroya Handverksmeistarafelag. T.e. tímalønin verður smb. § 10. Sveinalønir longri handverksútbúgvingar, við ískoyti smb. § 20, yvirtíðarløn 2.

**§ 17. Frádráttir**

Ásetingin í stk. 7, viðv. frádráttinum hjá línuskipum, verður strikað.

**§ 22. Tryggingar**

Stk 14 (25). Fyrra brotið, verður broytt soleiðis: "Reiðarans partur av eftirlønargjaldi er kr. 45,00 pr. Útmynstringardag".

**Viðv. Protokollatið fyri felagið Hvalnes, Næraberg og Nótaflotan**

Semja er um at seta protokollatið úr gildi.

***2. Partur. Serreglur.***

**§ 36. Kraftblokkaskip við nót og troli**

**Fyri allar bólkar í § 36 verða eykapartarnir broyttir soleiðis:**

| | |
|---|---|
| "Stýrimaður | 0,81 eykapart |
| 2. stýrimaður | 0,55 eykapart" |

**§ 38. Trolarar á ísfiskaveiðu**

Javnbýtisprocentið broytist soleiðis:

"Av avlopinum fær skipari og manning til javnbýtis 27%."

**§ 39. Lemmatrolarar á ísfiskaveiðu**

Javnbýtisprocentið broytist soleiðis:
"Av avlopinum fær skipari og manning til javnbýtis 27%."

**§ 40. Trolveiða eftir ídnaðarfiski**

Ískoyti viðv. eykapartum:

| | |
|---|---|
| 2. stýrimaður | 0,15 eykapart |

**§ 44. Norðborg og Christian í Grótinum**

Broyting viðv. eykaparti:

| | |
|---|---|
| "Stýrimaður | 0,81 eykapart |
| 2. stýrimaður | 0,55 eykapart |
| 3. stýrimaður | 0,25 eykapart" |

**§ 43. Næraberg**

Broyting viðv. eykaparti:

| | |
|---|---|
| "Stýrimaður | 0,83 eykapartar |
| 2. stýrimaður | 0,60 eykapartar |

**§ 34. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. juli 2015 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast við 2 mánaða freist, til ein 1. apríl, tó í fyrsta lagi til 1. apríl 2017.

**Tórshavn, tann 15. Juli 2015**

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

*Annfinnur Garðalið, formaður*

**Føroya Reiðarafelag**

*Herálvur Joensen, stjóri*